

## Grønlendingar sett toskakvotu

Nøsta ár verður tað loyvt at fiska 20.000 tons av toski í grønlendskum sjógvi. Tað hevur landsstýrið avgjørt, og tað hevur sostatt valt at halda seg til tilmælini frá altjóða havgranskingarráðnum ICES, sum eru grundað á, at toskastovnurin hevur verið í stórari menning, tí fleiri góðir árgangir eru komnir undan. Landsstýrið hevur gjørt av, at útróðrarflotin kann fiska helvtina av kvotuni, og at hitt verður býtt millum tey størru skipini og onnur lond, sum hava rætt til at fiska tosk í grønlendskum sjógvi.

# Coaching av toymum



Sofie Maning



*Umsett hevur Barbara Dahl, certifiseraður Life- og Businnescoach*

Toymiscoaching er ein munadygg og virismikil tilgongd fyri størri og minni toymir.

Manning Inspire hevur í nøkur ár coacha toymum á virkjum, nevndum, íverksetarum, leiðarum, ítróttarfólkið, skúlum, listafólkið, akademikarum, grafikarum, ráðgevum, arkitektum, hondverkarum, kommunalum HR-deildum, teleselskapum, medisinalvirkjum, sakførarum, sálarfrøðingum, osfr. osfr.

Coaching av toymum liggur tætt uppat coaching av einkult persónum, men skilir seg sjálvandi frá á avgerandi økjum, fyrst og fremst tí at tað handlar um, at tú sum coach hevur fleiri – heilt upp í 15 – fólk at cocha samstundis. Det er nógv meira tíðarkrevjandi og innvikla at coacha einum heilum toymi, og tað krevur at coachurin hevur eitt gott yvirlit og hevur fokus á heildini. Samstundis má coachurin vera varugur við tann einstaka og teirra mynstur, leiklutir og hvussu tey ávirka toymið. Tað eru tí nógvir bóltar í luftini, tá tað verður coacha í toymi, og tað er vanligvís ein stuttlig og mennandi tilgongd fyri øll í toyminum – eisini fyri tey ið vóru ivingarsom tá tey komu.

Ein av teimum spurningum, eg oftast veri spurd í samband við coaching av toymum, er um ein kann coacha toymir, ið ikki sjálvi hava biði um at blíva coacha. Og ja, tað kann ein saktans! Øll menniskir eru motiveraði av einum ella øðrum. Kynstrið sum toymiscoach er at finna inn til akkurát tað, ið motiverar hetta toymið og teir einkultu limirnar.

Sum coach upplivi eg ofta, at tað eru tær foringar, ið toymi sær sum størstu trupulleikar - so sum hørð kapping, minking í sølu, ein uppsagnarrunda ið ger at fólk missa hugin til arbeiði ella ein samanlegging við einari aðrari fyritøku – ið enda við at vera akkurát tað, ið ger munin fyri toymis-starvsfólkið, og sum til síðst vísir seg at blíva drívkrakftin og tað ið eggjar fyri at náa málunum.

Mínar royndir við coaching av toymum eru harumframt, at tey úrslit, hon skapar, ofta enda við at geva nógv meira, enn tey mál, sum toymið hevði sum útgansstøði. Tað er eisini galdandi fyri starvsfólk, sum í byrjanini ikki høvdu hug at blíva coacha. Tí at út yvir at náa størri vitan verður deild, (vidensdeling), betur sølu, felags visión og so framvegis, eru tað eisini nógvir síðuvinninningar (sidegevinster) við toymiscoaching. Tað er m.a. felags kunnleiki, vitan, tilfeingið hugskot, orka og føla meira ábyrgd fyri starvinum. Ofta sær man stutt sagt, at samarbeiði trakkar í kraft undur og aftaná toymiscoaching. Tað hongur saman við at reglurnar fyri toymiscoaching er, at øll í toyminum vera hoyrd, og at gamlir vanar og mynstur bliva útfordraði av coachinum í einum opnum, stýrdum dialogi, ið kann frígera eina rúgvu av møguleikum í toyminum.

Í mínum eygum er hesir síðuvinningar við toymiscoaching nakað av tí mest sentrala, tí tað er ofta her, at tann veruliga toymiskenslan, arbeiðssemi, at fara eftir málinum (målrettethed) og áhugin verður skaptur. Tí endi eg altíð hvønn fund (session) við toymiscoaching við eini afturboðan , hvar eg bara hyggi at møguleikum, ómetaliga tilfeingi og førleikum, ið eg havi sæð ígjøgnum dagin, og sum toymið rúmar.

Toym kunnu altíð nógv meira, enn tey sjálvi halda og vita. Tey skulu bara vegleiðast til at fáa eyga á tað.




Vit elska góð tíðindi

About 80 % of businesses are expected to be using SharePoint by 2010, according to Gartner Research

Okkara kundar hava valt SharePoint framum aðrar skipanir innan:

- Uppgávustýring
- Skjalasavn
- Skjalahandfaring
- Dátu innsavning
- Workflow
- Intranet
- Extranet
- Internet/heimasíðu

Hevur tú fingið røttu ráðgevingina?

Stutt sagt so elska vit at loysa uppgávur í SharePoint!

intra

intra@intra.fo
+298 599 123

**Intra** er leiðandi innan Microsoft SharePoint við kundum á privata og almenna økinum, bæði í Føroyum og í Danmark. Vit hava hollar royndir innan Microsoft, .NET, SharePoint og Office 2007.